gult4 cyan4 magenta4 svart4



# Marianna flotað aftur

**Útróðrarbáturin Marianna av Strondum, sum fekk stóran skaða í illveðrinum í oktober í fjør, er nú flotað aftur eftir umvæling á Tórshavnar Skipasmiðju**

FISKIVINNA
*Edvard Joensen*

Útróðrarbáturin Marianna av Strondurmliggur nú aftur á floti við Fiskasentralin í Havn. Hon hevur fingið eina rættiliga stóra umvæling á Tórshavnar Skipasmiðju.

Tað var í illveðri í oktober í fjør, at aluminiumsbáturin Marianna fekk rættiliga stóran skaða við bryggjuna i Heygsstøð á Strondum. Eitt størri skip, brunnbáturin Víkingur, sleit og rak niður á Marionnu, sum kroystist illa millum Víking og bryggjuna.

Sonni Johansen á Strondum, sum eigur Marionnu, sigur, at báturin, nú hann flýtur aftur, hevur verið ígjøgnum eina at kalla fullkomna umvæling. Heilt nógv av skrokkinum er skift út, sigur hann. Ampteringin varð øll tikin úr og er sett í aftur av nýggjum. Línuskipanin varð tikin úr, er umvæld og ímonterað aftur. Eisini motorarnir hava verið úr.

– Báturin hevur stutt sagt verið reinsaður, allur sum hann er, sigur Sonni Johansen.

Hann sigur, at hendan umvælingin fer at kosta nógvar pengar. Helst verða tað fleiri miliónir, sigur Sonni Johansen uttan tó at vilja nevna nakað tal.

Sonni Johansen sigur, at hann væntar, at báturin verður klárur at fara til fiskiskap aftur um eina góða viku ella so. Ætlandi skuldi hann roynast í gjár, og so er okkurt smávegis eftir at taka hond í, sigur hann.

Hann hevur annars róð út sjálvur triði við einum glasfipurbáti í vetur. Teir hava róð við línu mest vestanfyri, sigur Sonni Johansen. Onkran túr hava teir verið norðanfyri, og hann letur at, at tað hevur roynst hampiligt. Teir hava ikki verið við snellu í vár. Bara einar fimm dagar, meðan streymurin var harður, sigur hann.

Teir vóru seks mans við Marionnu, áðrenn hon fekk skaðan. Teir tveir hava so verið saman við Sonna í vetur, meðan hinir tríggir hava verið við øðrum skipum.

Sonni Johansen sigur, at tá Mariana verður klár at fara í drift aftur, væntar hann somu manning, sum var við í heyst.



*Útróðrarbáturin Marianna av Strondum er nú komin á flot aftur eftir at hava verið ígjøgnum eina rættiliga stóra umvæling á Tórshavnar Skipasmiðju*
*Mynd: Edvard Joensen*

# Nýtt farmaskip



*Fyrsta lastin varð lossað úr Atlantic við kranabilum. Men tá skipið verður klassað, fær tað eisini egnan krana á dekkið, eins og síðuskrúvur verða ísettar*
*Mynd: Edvard Joensen*

**N.A. Transport í Streymnesi hevur keypt danska farmaskipið Ardua. Skipið, sum nú eitur Atlantic, fer at føra alifóður fyri Skretting úr Noreg til Føroyar**

FARMAFLUTNINGUR
*Edvard Joensen*

Seinasta farmaskipið, sum komið er í føroyska flotan, eitur Atlantic og er skrásett í Streymnesi. Skipið skal brúkast til flutning av alifóðri úr Noreg til Føroya.

Tað er N.A. Transport í Streymnesi, sum hevur keypt danska farmaskipið Ardua úr Svendborg. Skipið, sum er smíðað í Ringkøbing í 1978, er 60 metrar langt, 10 metrar breitt og lastar 1.240 tons deyðvekt. Atlantic, sum skipið nú eitur, hevur 1.000 HK Callesen maskinu og gongur 11 míl.

Niels Andrias Mortensen, sum eigur N.A. Transport, sigur, at skipið fer at kosta einar fimm-seks milliónir krónur, tá tað er siglingarklárt.

Atlantic er keypt óklassað, og skal til klassingar á Tórshavnar Skipasmiðju, áðrenn skipið fer í regluliga sigling.

Niels Andrias Mortensen sigur, at skipið er í góðum standi, og ikki er serliga nógv at gera við tað. Tó skulu bummarnir takast úr og krani setast á dekkið, eins og síðurskrúvur skulu setast í. Bæði aftan og framman.

Síðuskrúvurnar eru neyðugar, tí skipið skal lossa fóður beinleiðis til alibrúkini. Og tá er neyðugt at kunna »manøvrera« væl.

Tað verða tvær manningar upp á fimm mans hvør við Atlantic. Rutan verður millum Stavanger og Føroyar.

N.A. Transport, sum hevur lastbilar og truckar, hevur eisini avtalu við Skretting í Føroyum um lossing og flutning av fóðrinum, sum felagið selur.

Fyrr hevur fóðrið verið flutt við leigaðum skipum til Hvalvíkar, har Skretting eigur pakkhús. Men Niels Andrias Mortensen sigur, at teir mettu tað vera betri at hava egið skip. Tað hevur fleiri fyrimnir, sigur hann. Eitt nú regluligari flutning, eins og lættari verður at sleppa til alirstøðirnar. Hann væntar eisini, at flutningurin fer at vaksa.

Atlantic fer væntandi í regluliga sigling fyrst í mai, væntar Niels Andrias Mortensen. Á fyrsta túrinum til Føroya var einki alifóður við, men cement til Løvubetong á Eiði og seyðafóður til MBM Fóður í Kollafirði.

gult5 cyan5 magenta5 svart5



# Lindin skiftir frekvens í Klaksvík

**Á middegi í dag fer útvarpsrásin, Lindin, at senda á 103 MHz av Brúnaskarði, og so skuldi alt útvarpsórógv í Klaksvík verið burtur**

ÚTVARP
*Eyðun Klakstein*



*Í dag verður sendarin hjá Lindini á Brúnaskarði fluttur til 103 MHz, har rásin fer at senda framyvir.*
*Mynd: Regin Samuelsen*

**Klaksvík:** Kristiliga útvarpsrásin, Lindin, fer í dag at senda við nýggjum frekvensi í Klaksvík.

Á middegi verður sendarin hjá rásini broyttur, soleiðis at sendingarnar verða at hoyra á 103 MHz ístaðin fyri 105 MHz, har rásin hevur sent higartil.

Orsøkin til hetta er, at órógv hevur verið FM-bandinum, síðani Lindin fór at senda av Brúnaskarði. Rásin fekk frekvensin 105 MHz at senda á, men tað hevur síðani víst seg, at hesin frekvensurin passar ikki saman við hinar rásirnar, sum senda av Brúnaskarði.

Fjarskiftiseftirlitið hevur nú latið Lindini nýggjan frekvens, og tað skal síðani syrgja fyri, at øll fara hoyra útvarpsrásirnar betur.

### Nýggja antennu

Preben Hansen, nevndarformaður hjá Lindini, fegnast um, at viðurskiftini í Klaksvík koma uppá pláss, hóast tað í grundini ikki er Lindin, sum hevur havt ábyrgdina av órógvinum.

Sendarin og antennan hjá Lindini í Klaksvík verða flutt frá 105 MHz til 103 MHz. Ivamál hevur verið um, hvørt antennan kann flyta frekvens, men umvegis mátingar er komið fram, at tað kann antennan, hóast hon missir nakað av styrkini.

– Vit fara at fáa nýggja antennu úr USA til Brúnaskarð um nakrar vikur, og tá verður antennan á Brúnaskarði so flutt til Suðuroyar, har vit skulu senda á 105 MHz, sigur Preben Hansen.

# Framsýning av verkum hjá Elinborg Lützen

**Skírshósdag letur framsýning við verkum eftir Elinborg Lützen upp í Klaksvík. Framsýningin verður opin um páskirnar**

LIST
*Eyðun Klakstein*

**Klaksvík:** Verk eftir listakvinnuna Elinborg Lützen verða um páskirnar at síggja í Klaksvík.

Skírshósdag letur framsýningin upp, og hon verður at síggja allar páskirnar. Framsýningin verður í ovastu hædd á býráðshúsunum, har Norðoya Listafelag heldur til.

Framsýningin varð sett saman í sambandi við 80 ára dagin hjá Elinborg Lützen í 1999.

Framsýningin var at síggja í Listaskálanum, men nú hevur Norðoya Listafelag syrgt fyri, at framsýningin eisini verður at síggja í Klaksvík.

### Eisini tónleikur

Elinborg Lützen varð fødd í Klaksvík í 1916. Hon fór sum 11 ára gomul til Havnar at ganga í skúla, og seinni fór hon eisini til Danmarkar í somu ørindum. Hon kom tí fyrst í fimtiárunum aftur til Klaksvíkar at búgva.



*Verk eftir listakvinnuna Elinborg Lützen verða um páskirnar at síggja á framsýning í býráðshúsunum í Klaksvík*

Elinborg Lützen sýndi verk síni fram á framsýningum í Føroyum og uttanlands, og meginparturin av verkum hennara eru svartmyndir.

Framsýningin í Klaksvík letur upp hósdagin klokkan 16.00, og tá verður eisini tónleikaframførsla. Nikolaos Kapnas, Bogi Lützen og Jens Christian Guttesen fara at spæla eina strúkitrio eftir Joseph Gehot. Eisini fer Kapnas at spæla eina variatión fyri bratsj eftir William Heinesen.

# Færri túrar

**Í dag kemur estlendska ferjan, Scania, til Klaksvíkar og fer í sigling ein av fyrstu døgunum. Ferjan fer at sigla millum Klaksvík og Fuglafjørð, og tað gevur færri túrar**

SAMFERÐSLA
*Eyðun Klakstein*

**Klaksvík:** Á páskum fer ferjan Scania undir siglingina um Lorvíksfjørð. Estlendska ferjan skal eftir ætlan koma til Klaksvíkar í dag, og síðani verður farið undir siglingina, so skjótt sum gjørligt.

Gongst væl verður hetta longu í morgin, men um skipið ikki verður klárt so skjótt, byrjar siglingin leygardagin.

Scania fer at sigla millum Klaksvík og Fuglafjørð, og hóast ferjan siglur nakað skjótari enn Dúgvan, verður talan um færri túrar, tí teinurin millum Fuglafjørð og Klaksvík er væl longri enn tann millum Lorvík og Klaksvík.

### Størri enn Dúgvan

Scania er tó stór ferja, sum tekur fleiri bilar enn Dúgvan, og tí verður helst talan um minni bíðitíð hjá mongum sammett við støðuna seinastu vikurnar, Ternan hevur røkt siglingina.

Scania tekur 80 akfør og 400 ferðafólk, og skal ferjan samalíknast við strandfaraskip, er støddin á henni millum Dúgvuna og Smyril.

Strandferðslan hevur havt stórt stríð við at fáa avloysaraferju. Tað eru nógv viðurskifti, sum skulu upp á pláss, áðrenn eitt skip kann leigast, og hósdagin hevði Strandferðslustjórin hug at geva upp, tí tað gekk so seint við teimum formiligu viðurskiftunum.

Men so kom glið á, og nú er Scania á veg til Føroyar.

### Støðugur vandi fyri brekum

Løgtingið hevur játtað 2,5 milliónir krónur til leigumálið av Scania, og prísurin fyri ferjuna úr Estlandi er 37.000 krónur um dagin.

Dúgvan verður nú umvæld, og hon skal eftir ætlan fara í sigling aftur 1. mai, og tá fer Scania so at røkja Suðuroyarleiðina, tí Smyril skal í dokk.

Hóast Scania nú fer í sigling, og tænastan verður betri á Lorvíksfjarðaleiðini og um Vestmannasund, kann strandferðslustjórin ikki veita trygd fyri, at alt verður í lagi komandi vikurnar.

Hann segði í farnu viku við Sosialin, at skipini hjá Strandferðsluni eru so gomul og slitin, at vandi er altíð fyri tekniskum brekum, sum kunnu leggja okkurt skip.

i
Sosialurin

